# Hugnaligt tiltak á Bryggjubakka


Hugnaligt tiltak verður Undir Bryggjubakka leygardagin, har fólk millum annað kunnu fara fiskitúrar

Í gjár fór SamVit í gongd við herferðina Frí í Føroyum 2007, sum hevur til endamál at eggja føroyingum at ferðast í Føroyum. Stjórin á SamVit, Elin Heinesen, setti Frí í Føroyum á torginum í SMS í gjár, og í hesum sambandi fer SamVit at skipa fyri ymiskum tiltøkum hetta vikuskiftið.

Eitt av hesum tiltøkum verður Undir Bryggjubakka í morgin. Her verða hugnaligir harmonikutónar, grillaður fiskur, pylsur, kaffi, te og køkur. Skiparar úr Vestmanna, Vági og Klaksvík fara at skipa fyri bátaferðum. Eitt nú fer Magni Blástein at gera fiskitúrar, og Birgir Enni fer at sýna fram nýggja skjóttgangandi taxabátin. Sosialurin hevur tikið eitt lítið prát við Magna Blástein hesum viðvíkjandi.

Magni sigur, at tað gongur fínt við fiskitúrunum, sum hann skipar fyri.

- Ja, eg haldi, at tað gongur fínt. Fólk hava bílagt nakrar túrar niðurfyri í summar, og tað eru serliga danir og týskarar, sum vísa áhuga. Leygardagin fáa føroyingar tó møguleika at royna hetta undir tiltakinum á Bryggjubakka. Tá fari eg at hava nakrar túrar út á Havnarvág, har fólk fáa møguleika at fiska. Hetta fer vónandi at økja um áhugan í Føroyum.

Umframt Magna Blástein og Birgir Enni fer eisini at vera møguleiki at síggja skjóttgangandi speedbátin, Scorpion, sum Sigurd Gudmundsson í Vági eigur, og Komet, sum er ein fiskibátur úr Klaksvík.

Uttanduratiltakið verður einans, um veðrið er til vildar.




















